Biologassistentur til Føroya Náttúrugripasavn

Føroya Náttúrugripasavn er stovnur undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum og fevnir um Plantusavnið og Djórasavnið.

Føroya Náttúrugripasavn hevur til endamáls at granska, savna, varðveita, handfara og framsýna landsins náttúrufrøðiligu virði. Herundir arbeiðir Djóradeildin eisini við havsúgdjórum, ið er málsøkið hjá Fiskimálastýrinum.

Við tí endamáli at menna granskingina av havsúgdjórum verður við hesum søkt eftir biologassistenti á Djóradeildina á Føroya Náttúrugripasavni.

Starvið
Høvuðsuppgávan hjá bioligassistentinum er at verða hjálparmaður í sambandi við verkætlanir um havsúgdjór og herundir at savna tilfar til djóradeildina á savninum.

Viðkomandi skal eisini kunna taka lut í øðrum arbeiði á djóradeildini á Náttúrugripasavninum.

Førleikakrøv
Kravt verður, at umsøkjarin:
- hevur kunnleika og royndir viðv. havsúgdjórum
- hevur royndir til sjós
- dugir at tosa enskt
- hevur vanligt koyrikort

Treytir
Setanartreytir og løn verða sambart sáttmála millum Fíggjarmálastýrið, og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálastýrið, og arbeiðsplássi verður Føroya Náttúrugripasavn. Setanin fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini.

Umsókn
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, mugu vera Føroya Náttúrugripasavni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
Føroya Náttúrugripasavn, Debesartrøð, V.U. Hammersheimsgøta 13, 100 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Náttúrugripasavnið á tlf. 318588 og tosa við Dorete Bloch, stjóra.

FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN, Djóradeildin
Fútalág 40
100 Tórshavn
Tlf. 318588
Fax 318589
E-mail: doreteb@ngs.fo

Yvirlýsing

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag ber fram ósonn tíðindi

Útvarpið bar um vikuskiftið tíðindi um, at Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag ber tey tíðindi, at hann ongantíð hevur sagt, at limirnir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag skuldu gerast limir í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Eisini verður Karl Johansen í útvarpinum endurgivin fyri at siga,at hann á fundi við undirritaðu feløg, hevur mælt til at samráðingar verða um viðurskiftini, nú Kollafjarðar Kommuna er løgd saman við Tórshavnar Kommunu.

Undirritaðu feløg skulu við hesum gera vart við, at hesi tíðindi frá Karl Johansen er beinleiðis í stríð við veruleikan.

Á fundinum sum hildin var, boðaði Karl Johansen frá, at eingin annar møguleiki var enn at limirnir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag gerast limir í Havnar Arebiðsmannafelag.

Hóast bæði undirritaðu feløg og Havnar Arbeiðskvinnufelag mæltu til at samráðingar vóru tiknar upp fyri at fáa greiðu á viðurskiftum, so vísti Karl Johansen avgjørdur aftur yvirhøvur at samráðast um hendan spurning.

Tað er átaluvert, at fakfelagsformaður ikki bert fremur ágang móti øðrum fakfeløgum, men síðani stingur halan millum beinini, og enn meira átaluvert er tað, at sami formaður ber beinleiðis ósann tíðindir í føroyskum fjølmiðlum.

Tórshavn, tann 18.1.2001.

Ingeborg Vinther, Føroya Arbeiðarafelag
Hans Madsen, Kollafj. Arbeiðarafelag

Frá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Ársaðalfundur Leirvíkar Arbeiðsmannafelag verður 21. februar 2001.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

Dagsskrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til ársaðalfundin skal vera nevndarformanninum í hendi í seinasta lagi 14. februar 2001.

PF. Restorffs SISU

Fiskimálastýrið

Leiðari til MRCC-Tórshavn

Í samband við at Fiskimálastýrið nú fer at seta á stovn eina føroyska havbjargingarmiðstøð, MRCC-Tórshavn (Maritime Rescue Co-ordination Centre), verður hervið lýst eftir samskipandi leiðara.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:
- Dagligt sum fultrúi hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni (V&B) við ábyrgd fyri MRCC-Tórshavn
- Samskipandi leiðari á MRCC-Tórshavn, tá SAR (leiting og bjarging) støður koma fyri
- Hevur ábyrgd av SAR átakinum, leggur tilrættis og tekur endaligar avgerðir
- Samskipar átakið við tí útgerð og fólki, mett verður neyðugt.
- Samstarv við stovnar/feløg í Føroyum og uttanlanda
- Ferðing til samstarvsfundir

Førleikakrøv:
- Hægstu nautisku ella aðra viðkomandi útbúgving
- Dugir væl at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum
- Er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevnir
- Hollan kunnleika til teldur

Vaktar- og Bjargingartænastan bjóðar:
eitt avbjóðandi og sjálvstøðugt starv, við at uppbyggja og reka eina føroyska bjargingarmiðstøð eftir fyriskipanum hjá altjóðafelagsskapinum IMO. Ískoytis útbúgving.

Persónligar eginleikar:
duga væl at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir. Vera fyrikomandi og duga at samstarva við allar partar í tilbúgvingini her á landi og í útlandinum.

Setanartreytir:
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 34. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálastýrið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

Meira fæst at vita:
um starvið við at venda sær til Djóna Weihe, tlf. 31 10 65 ella 31 39 80, teldupost dw@vb.fo

Umsóknir:
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða **Vaktar- og Bjargingartænastuni postrúm 347, 110 Tórshavn**, í hendi áðrenn 01. februar 2001.

Størvini vera at seta 15 februar ella eftir nærri avtalu.

Løn sambært avtalu við avvarandi yrkisfelag.

Størvini eru treytað av mynduleikagóðkenning og at skipanin verður sett í verk.

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

Hevur tú hug at handla ?

Millennium er til sølu !

Her hevur tú ein frálíkan møguleika til, við lagaligum treytum, at yvirtaka ein góðan handil, sum liggur sera væl fyri niðri í Vágsbotni.

Tú kanst sleppa í gongd so skjótt sum tú vilt.

Sp/f Millennium
Vágsbotnur
Postboks 3166
100 Tórshavn

Meira fæst at vita við at ringja á tel. 32 22 22 ella 22 22 22 og tosa við Knút.

MILLENNIUM er ein nýmótans handil, sum selur mótaklæðir til kvinnur. Handilin liggur sera vel fyri á fyrstu hædd í húsinum "hjá Jóan Jakku" í Vágsbotni, við útsýni yvir Nólsoyar Páll og Vestaru Vág.

MILLENNIUM
VÁGSBOTNUR • TEL 31 80 80

Dansiskeið

Um nóg nógv tekna seg verður dansiskeið í losjuni í Gøtu,

vikuskiftið 26. og 27. januar.

Undirvíst verður í eingilskum dansi: Fox-Trot, Quick-Step, Rock´n roll, valsi o.ø. Skeiðið er fyri øll dansiáhugað: Pør-støk, børn-ung, nýbyrjarar og vandar dansarar. Aldursmark 7 ár. Anna Kristin av Tvøroyri undirvísir.

Dansa verður í holdum

Hold 1:	Børn 7-9 ár
Hold 2:	Børn 10-14 ár
Hold 3:	Nýbyrjarar
Hold 4:	Vandir dansarar

Kostnaður fyri skeiðið

Børn	kr. 50,-
Vaksin	kr. 150,-

Fríggjadagin 26. januar dansa vit hesa tíðir:
Hold 1: kl. 15.00-16.00
Hold 2: kl. 16.15-17.15
Hold 3: kl. 18.00-20.00
Hold 4: kl. 20.15-22.15

Leygardagin 27. januar dansa vit hesar tíðir:
Hold 1: kl. 11.00-12.00
Hold 2: kl. 13.00-14.15
Hold 3: kl. 14.30-16.15
Hold 4: kl. 16.30-18.15

Tilmelding á tlf. 442122 og á tlf. 441944, frá mánakvøldinum 22. januar. Til mikukvøldið 24. januar millum kl. 19.00 og 22.00.

Leygarkvøldið 27. januar verður almennur dansur frá kl. 23.00.
Kostnaður fyri dansin kr. 50,-

Svimjifelagið Skeggjar

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
Føroya Gjaldstova
Tradepute 39, Postmoga 2009, FO-165 Argir, Føroyar

Starv sum KT-leiðari á Føroya Gjaldstovu leyst at søkja

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum KT-leiðari á Føroya Gjaldstovu er leyst at søkja, nú KT-leiðarin ætlar at royna nýggjar avbjóðingar.

Gjaldstovan hevur seinastu árini arbeitt við at nýskipa almenna roknskaparverkið, og hevur tí lagt nógv arbeiði í at taka í nýtslu nýggjar EDV-skipanir, sum eru beinagrindin í búskaparstýring landsins.

Tað er sera umráðandi, at tað arbeiðið, ið er gjørt fyri at náa tað stigið, gjaldstovan er á í dag, kann halda fram í eini natúrligari tilgongd, og krevur hetta eina støðuga menning og viðlíkahald av Búskaparskipanum landsins. EDV-skipanirnar eru lívsæðrin í landsins búskaparstýring, og tí er KT-økið á gjaldstovuni so týdningarmikið.

Í starvinum sum KT-leiðari, hevur ein góðar møguleikar fyri persónligari menning, bæði fakliga og sum leiðari.

Starvið
Tú skalt vera leiðari av einari framtakshugaðari KT-deild, har tað í løtuni eru 6 fólk í starvi, við uppgávum sum fevna um gerð av yvirorðnaðum ætlanum fyri KT-økið, menningaruppgávur, ráðgeving og undirvísing á KT-økinum, umframt rakstur av einum fjøltáttaðum landsumfatandi EDV-kervi, ið fevnur um bæði miðsavnaðar og miðfirraðar ambætarar, við arbeiðsstøðum kring alt landið, ið byggir á Unix, Windows NT, Oracle og MS-SQL 7.

Ábyrgdarøkið
Starvið sum KT-leiðari er skipað sum deildarleiðarastarv beinleiðis undir stjóranum og er limur í almenna KT-forum sum umboð fyri Fíggjarmálastýrið.

KT-leiðarin hevur ábyrgdina av:
- Dagligu leiðsluni og fyrisitingini av EDV-deildini umframt netumsitingini í Fíggjarmálastýrinum.
- At tryggja eina áhaldandi persónliga og fakliga menning av starvsfólkunum á EDV-deildini.
- At orða KT-strategi og virksætlanir hesum viðvíkjandi
- At menna EDV-trygd og EDV-politikk stovnsins og at góskutryggja KT-økið
- At reka, menna og viðlíkahalda EDV-skipanir stovnsins t.d. Fíggjarstýringarskipan landsins (FSL), ið er grundað á Oracle Applications fornitið. Nevnt kann verða, at ætlanir eru um brúk av internetinum til t.d. sjálv-(av)greiðslu.
- At menna og viðlíkahalda EDV-skjalfesting stovnsins, ið fevnir um skjalfesting av EDV-skipanum, tøknniliga bygnaðinum, avtalum við EDV-útvegarar o.t.
- At umsita KT-fíggjarætlan stovnsins, herundir samráðast og gera avtalur við EDV-útvegarar.
- KT-verkætlanum stovnsins, ið umframt projektleiðslu fevnir um kravfesting, undirvísing og innkoyring av nýggjum skipanum. Nevnt kann verða, at ein nýggj felags lønarskipan fyri allar almennar stovnar skal setast í verk í vár.
- Dagliga rakstrinum og umsjónin av tøknliga infrastrukturinum, sum m.a. fevnir um tvær HP9000, HP-UX 11.0 teldur, Windows NT net-ambætarar og umleið 250 teldur.

Førleiki
Tann, ið verður settur, skal helst hava hægri útbúgving og drúgvar royndir í beinleiðis arbeiði við fyrisitingarligum skipanum t.d. at hava forritað, gjørt kravfestingar ella hava verið verkætlanarleiðari í tillíkum arbeiði, sum krevst fyri at umsita nevndu ábyrgdarøki. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til bókhald og roknskap.

EDV-deildin hevur eisini markamót til nógvar aktørar uttan fyri stovnin, tí er tað so umráðandi, at viðkomandi, ið verður settur, hevur góð samstarvsevnir, fyrisitingarligt hegni og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til KT yvirhøvur, og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj amboð innan KT-økið. Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú kennir til Oracle-amboðini, so sum Oracle Browser, Oracle Discoverer og Oracle Report Writer.

Lønarviðurskifti
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við viðmælum og prógvum mugu vera Gjaldstovuni í hendi í seinasta lagi 12. februar 2001 og skulu sendast til:

Føroya Gjaldstova
P.O. Boks 2009
FO-165 Argir

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til stjóran, Leif Abrahamsen.

Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum. Ábyrgdarøkið kann natúrligt liðast sundur í hesar høvuðsuppgávur:
Landsins roknskaparhald - herundir menning, viðlíkahald og rakstur av landsins roknskaparskipan. Gjaldstovan førir í dag bókhald fyri tær flestu høvuðskonturnar á fíggjarlógini og heldur roknskap við ogn og skuld landskassans. Stovnurin umsitur eisini fleiri almenn lán og avgreiðir allar útgjaldingar úr landskassanum og ger landsroknskapin.
Lønarumsiting fevnir um eina menning, viðlíkahald og rakstur av eini miðsavnaðari skipan til útgjalding av almennum lønum. Verkætlanin byrjaði í 1999 og verður fyrsti partur av skipanini tikin í nýtslu til várs. Skipanin verður liðugt innført 2003.
Á Gjaldstovuni starvast í dag umleið 30 fólk. Stovnurin er skipaður í 4 deildir, sum eru roknskapardeild, lønardeild, fíggjardeild og EDV-deild. Deildarleiðarnir saman við stjóranum eru leiðsla stovnsins.

HAVNAR BIO



Frumsýning
Billettprísur: 65,- kr.
Leygardagin 20.01.kl. 20[00]
Leygardagin 20.01.kl. 23[00]
Sunnudagin 21.01.kl. 19[00]
Sunnudagin 21.01.kl. 22[00]

Leygardagin 20.01.kl. 23[00]
Sunnudagin 21.01.kl. 21[00]

Leygardagin 20.01.kl. 21[15]
Sunnudagin 21.01.kl. 23[00]

Leygardagin 20.01.kl. 19[00]
Sunnudagin 21.01.kl. 18[45]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning
Fríggjadagin 26.01.

www.in.fo/havnarbio